Global Battle of the Bands:

# Favorittarnir vunnu



**Fyrsta innleiðandi umfar í Gbob kappingini gjørdist eitt lunkað upplivilsi, sum ikki bjóðaði okkum nakrar einastandandi framførslur. Lama Sea, Moja, Frostbit, The Dreams, Týr og Synarchy vóru bólkarnir, sum spældu seg til rættin at luttaka í tjóðarfinaluni leygarkvøldið**

TÓNLEIKAKAPPING
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Mentunarhúsið var heldur deyðligt í gjár. Har var ikki gjørt nakað serligt burturúr at prýða hølini, og fólk tóktust ikki ordiliga at vita, hvussu tey skuldu uppføra seg. Har mátti líka sum ein kollektivur dialogur til, áðrenn stemningurin loysnaði eitt sindur, men áskoðarafjøldin kom ongantíð upp á hæddirnir, sum hesir bólkarnir hava uppiborðið. Generelt var ljóðið rættiliga óruddiligt, men tað gjørdi ongan bilsnan, tí bólkarnir høvdu ikki nakrar ljóðroyndir áðrenn konsertina.

Heilir 12 bólkar luttóku í kappingi í gjár, og eg fari at royna at skriva eitt lítið brot um hvønn teirra.

Fyrsti bólkur á pallin var **Purpur**. Tey lýsa teirra tónleik sum kristnan, melodiøsan rokk, og tað er heldur ikki langt við síðunar av. Tó kann ein kjakast um tað melodiska elementið, tí mín uppfatan av teirra tónleiki er at melodiirnir eru at finna í gittarlinjunum heldur enn í sanglinjunum.

Tá ið hugsað verður um, at bólkurin var stovnaður í 2005, kunnu vit siga at teirra framførsla var ók. Har var ikki nógv hjá dómarinum at fara eftir, tí at tey høvdu ikki so nógv "egið" í sínum tónleiki. Men Purpur spældi fínt, og gav okkum eina fína byrjan uppá eitt spennandi kvøld.

Og so komu stóru favorittarnir á pallin. Nógv vænta sær nógv av Lama Sea, og hetta er merkisvert tá ið hugsað verður um, at bólkurin ikki er so gamal. Lama Sea komu brestandi inn í okkara tónaverð til undanfarna Prix Føroyar, og úrslitið gjørdist at teir nú mugu røkja favorittrolluna.

Um teir vóru nervøsir at byrja við, veit eg ikki, men teir vóru rættiliga spakir í fyrstuni. Teir løgdu heldur friðarliga út, men útloystu so orkubumbuna í okkara andlit við næsta lagnum. Teir eru feitir at hyggja at, tí teir hava eina tjekkaða "her komi eg"-atitydu. Og so er tónleikurin eisini heilt ótrúliga stuttligur og hendingarríkur at lurta eftir. Teir komu væl frá teirra framførslu, sjálvt um eg onkuntíð saknaði eitt sindur meir av konsentratión í spælingini. Har vóru nakrir smærri feilir, og onkrar passagir sótu ikki so væl, sum man kundi ynskt sær.

**Almost Perfect** er ein trio. Teir fingu eina langt frá Almost Perfect byrjan, við at oyðileggja tann eina gittarin. Hetta seinkaði teirra framførðslu nakað, men skjótt kom ein gittarleikari og bjóðaði sær at lána teimum sín gittara. Men so komu teir í sving, og hetta var ein fitt framførsla av friðarligum tónleiki. Tað var trupult hjá teimum at spæla "tight", tí tónleikurin var so mikið friðarligur, at áskoðarirnir hoyrdist minst líka væl sum teir. Teir spældu bara eitt lag, men har var materiali til nógv løg í hesum eina, tí at har vóru so nógv ymisk stykkir.

## Hjalti í brynju

Vanligi gittarleikarin hjá **Týr** er Terji Skibenes, men hann var sjúkur í gjár, og tískil mátti maður koma í manns stað. Og loysnin gjørdist legendariski Hjalti Joensen. Týr góvu Hjalta eina brynju, og so bumbaðu teir tónleikin í 5. gear. Teir spældu bara eittans (langt) lag, og tað var "Ramund hin unge". Ljóðið var ørkymlandi hjá Týr, tí at tú hoyrdi bara gittararnar frá pallinum, og tað er nógv ov spakuligt. Men so við og við, gjørdist ljóðið frægari, og tá kundi tú betur konsentrera teg um tónleikin. Týr var fyrsti bólkurin sum spældi ordiliga væl. Teir eru væl samanspældur (hóast Hjalti bara er avloysari), og teir hava eitt heilstoypt konsept, sum er ógviliga polerað. Hjalti hevur tó ein heilt annan stíl enn Terji Skipenes. Hann hevur eitt rundari, bleytari ljóð, men hóast tað so var hann ein perfektur avloysari. Tað var ongin ivi um, at Týr skuldu aftur á pallin leygarkvøldið.

**Frostbit** er ein bólkur úr Eysturoynni. Og sum eg havi verið inni á áður, so er tað ein bólkur sum tók Clickhaze´ianska ljóðið til sín. Tey spæla hetta slagið av tónleiki, har tú skalt flóta omanfyri skýggini og droyma teg inn í ørkymlandi, vakrar støður. Fyri meg, eru Frostbit alt ov nógv inspireraði av bólkunum norðanífrá. Tú hoyrir alt ov nógv elementir úr Cickhaze tíðini, og hetta er keðiligt, tí hendan kritikkin fingu tey eisini til undanfarna Prix. Kanska vilja tey ikki flyta seg frá hasum mátanum at spæla uppá, og tað er eisini fair, men tey mugu arbeiða uppá at finna okkurt egið í tónleikinum, tí sum nú er, er tónleikurin og lindið alt ov pátikið. Tey spæla annars útmerkað, men har var onki sum skaraði framúr hjá teimum. Melodiirnir vóru bygdir á laaaaangar sangstrofur, og hetta gjørdist sera troyttandi í longdini.

**TME** skrivaðu søgu. Tað er ein bólkur úr Hvalvík, og tað er ikki á hvørjum degi, at vit upplivað tónleik haðani. Tað hoyrdist at tónleikurin var rættiliga ferskur, og hevði havt gott av at fingið nakrar vikur afturat í venjingarhølunum. Men tað er at frøðast um, at hvalvíkingar eru fanir at blanda seg á føroyska tónleikapallinum.

Og so komu **The Dreams** á pallin. Frammanundan vóru teir skýrdir at verða favorittar at vinna seg í tjóðarfinaluna, og tá ið teir